FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Meeting of the UFI Board of Directors

| | |
|---|---|
| **Date:** | September 3, 2021 |
| **Time:** | 3 hours (8:30-11:30) |
| **Place:** | Hotel Brandan, Tórshavn (and on Zoom) |
| **Participants:** | *Board members:*<br>Ólavur Ellefsen (Chair)<br>Marita Rasmussen (Deputy Chair)<br>Anders Bjarklev (External Member)<br>Elaine Munthe (External Member)<br>Marin Strøm (Staff Representative)<br>Jónrit Halling (Staff Representative)<br>Brandur Arnoarson (Student representative)<br><br>*Deputy board members:*<br>Martin Zachariassen (Deputy External Representative, participated via Zoom for first part of meeting)<br>Firouz Gaini (Deputy Staff Representative)<br>Anna Sofía Lava (Deputy Staff Representative)<br>Elberg Elias Klettheyggj (Deputy Student Representative)<br>Heidi Poulsen (Deputy)<br><br>*University administration attendees:*<br>Chik Collins (Rector)<br>Johan Hansen (University Director)<br>Kristianna Balle (Executive Secretary)<br><br>Bergur D. Hansen (Pro-Rector for Education, attending for Item 8)<br>Hugin Skaalum (Head of Finance, attending for Item 3)<br><br>Could not attend: Anna Kirstin Sigurðardóttir (Deputy External Representative) |
| **Minutes by:** | Kristianna Balle |

***See Faorese translation of the minutes on page 7**

**Agenda for Board Meeting: Friday 3rd September 2021, 08.30-11.30**

***Purpose of the meeting: To report and discuss recent developments and forthcoming challenges, and to advise and discuss regarding progress against the commitments and priorities of the Strategic Plan, 2020-2024***

**Agenda:**

**Part 1: 8.30-9.45**

1. Chair's welcome and approval of Agenda (Paper 1)
2. Approval of minutes from meeting of 11th May (Paper 2)
3. Finance Report – from Head of Finance (Paper 3)
4. Operation of the Board/decision making (including nominations)
5. Rector's Report on period since last meeting (Oral Report – paper provides main headings. Paper 4)
6. Position of Dean in the Faculty of Health Sciences – proposed extension of current Dean's appointment.

**9:45-10:00**

*Comfort and Refreshment Break*

**Part 2: 10.00-11.30**

7. Rector's report on progress against commitments and priorities in the *Strategic Plan, 2020-2024* (Paper 5 – for presentation and discussion)
8. Forthcoming external Review of the University (Papers 6 & 7)
9. Campus Development (Oral report from Chair)

**1. Chair's welcome and approval of Agenda (Paper 1)**
The agenda for the meeting was approved.

**2. Approval of minutes from 11th May 2021 (Paper 2)**
There was a comment from a board member regarding item 4 in the minutes from the last Board meeting; the board member wanted to stress even more clearly that they found it unfortunate that we must charge fees for a programme that the University offers. The Rector in reply again expressed agreement but stressed also again that the programme had been created at the request of employers who were willing to pay, and that the programme would not exist otherwise – there was not funding from government for it. There was good mutual understanding. It was added that we will discuss again at Board meetings if we plan to charge fees for other programmes.

Afterwards, the minutes from 11th of May were approved.

**3. Finance Report – from Head of Finance (Paper 3)**
The Head of Finance presented the financial report for July. There is some surplus across the University, and in total there will likely be two million that we can spend before the end of the year. This reflects a very small proportion of the total budget, and we will aim to put it to good use in supporting professional development plans for staff and also in relation to some PhD projects affected by corona.

A board member mentioned that in Denmark government has allocated some money for social arrangements for students who all have been affected by the corona situation. It was suggested that the student's organization MFS or the Student Council might raise this with government. Also, the Student Council has a budget which it can use towards social activity, and there has been good social activity recently associated with the introduction week at the University. More generally, the impact on social life from corona on the Faroes has been much less than in Denmark.

**4. Operation of the Board/decision making (including nominations)**
There had been a request for some discussion about the decision making of the Board in general after a proposal (a nomination) from the Board was sent to the Ministry of Finance earlier this year. The proposal had been sent to the board members for approval via email and since no reply was given, the proposal was understood as approved.

It was suggested that it would be easier to make decisions if the suggested decision was clear and all members are asked to give an explicit answer. Some subjects can also be difficult to discuss through email, and in some cases there ought to be a (short) extraordinary meeting. It was also clear that if something is decided via email, it should be mentioned in the minutes in the subsequent Board meeting. A board member added that it was important that the whole board agrees on decisions and that voting only is used in rare cases.

It was agreed at the meeting today that we add an addendum to the minutes from last meeting regarding the nomination that was sent to the Ministry.

There was then a discussion about hearings that regularly are sent to the University. It was suggested that the Board could be consulted with hearings, but this was thought to be likely to be too time consuming if it were to be sent to the entire Board every time. Replies to hearings can instead be mentioned in a report/summary that is provided to the Board – unless it is a bigger question that requires Board discussion. A board member added that it would be better to always send one opinion from the University rather than several from all faculties. The view of the University should be that of the University and should come with the authority of the University leadership. It was mentioned as an idea to add all the hearings to the webpage, as a hearing is public information anyway.

**Action Point: University Director to follow up with relevant parties regarding hearings and consultations in which the University is to be involved.**

**5. Rector's Report on period since last meeting (Paper 4)**

The Rector spoke to his report on the work at the University since the last meeting. Together with the University Leadership Team, the Rector is trying to find the right balance to keep moving towards goals and implementing new changes without doing this in an unsustainable way.

Amongst other things covered in the paper, the Rector informed that the UFI has had the highest number of diplomas in a calendar year in 2020 and is on track to be at least close to matching that in 2021, and that we also had a big intake of new students in 2021. All faculties are focusing on progression and retention, and the graduation destination data look very good. The staff conversations (MCPDC) are progressing and going well. Another important subject is the work with quality assurances processes. The work with quality assurance is improving but it requires sometimes convincing staff. The work of the Research and Enterprise Unit is also progressing, but there are challenges in terms of getting staff to apply for external funding, and to do so in accordance with the approved procedure. Other items mentioned included the recognition of our law programme by the appropriate Danish authorities and the visit of Professor Frederick Schauer to the University back in June.

The Rector spoke about three intersecting higher-level challenges. These, he explained, are relevant also to item 7 on the agenda:

- The pace of change and the sustaining of change, especially when a lot of support can be required for staff to be able to deliver the changes or to work in accordance with them;
- To develop an understanding beyond the Leadership Team of the changes underway and why they are important. This is a matter of culture and professionalism. This is also for staff to understand that we are not always striving for excellence but are also catching up with basic ways of working adopted some time ago in other places. The forthcoming external review of the University is a very good opportunity to develop the required understanding. There was an extended discussion about this at the Extended University Leadership Team (EULT) at the end of August. The Rector also informed about the arrangement of an all-staff event next week where we will inform staff about the external review. This is an opportunity to give a whole university perspective and to build understanding and commitment to the changes we are implementing.
- The collaboration with the Ministry is generally very good, but not always ideal because they do not have a huge amount of experience with higher education.

It was asked if there was anything the Board could do in terms of pushing the Ministry regarding the extra intake of nurses and pedagogues. It was agreed that if there was not early progress, then the Chair of the Board would approach government on the matter.

The Board welcomed the Rector's report, which they found informative and helpful.

**6. Position of Dean in the Faculty of Health Sciences – proposed extension of current Dean's appointment**

The position of Dean in Faculty of Health Sciences is due for renewal and the current Dean is willing to continue. The Rector informed that the Dean is very active, productive, good at delegating and we use him extensively. He is also Pro-Rector for Research and Enterprise. The Rector informed that we have renewed the other deans the last couple of years without any further process, but with one exception, where a process was used at the request of the incumbent Dean (who was subsequently renewed). The Rector finally invited the Board to approve the Dean for extension.

The Board discussed the renewal and there was an agreement that we are not committed to automatic renewals. The period for the position as a dean is three years and now, there is no

apparent limit for how many times you can be extended in the position as Dean. It was suggested that a Dean could be extended for a second period, while for a potential third period there should be an open application process, as it is important to encourage others to apply and to aspire to becoming a Dean. The Board agreed that this should be the future process. The Rector informed that the faculties (with one current exception) have deputy deans and faculty leadership teams where we hope to produce good leaders who can become Deans in the future. All board members then approved reappointing the Dean in the Faculty of Health Sciences for a second term.

Payment for taking extra responsibility was also brought up. The Rector would like to discuss further with the Ministry the financial rewards for taking on extra responsibility at the University and in general. He feels these are very slight.

**7. The Rector's report on progress against commitments and priorities in the *Strategic Plan, 2020-2024* (Paper 5 – for presentation and discussion)**

The Rector gave the half year report and informed that there is a version with tracked changes that can be sent to board members upon request. The rector went through the priorities and headline progress for these subjects:

- Education and Student Success
- Research and Enterprise
- People and Organization Development
- The Faroese Language
- External Engagement and Partnerships
- Resources

After the presentation, there was a question about KPIs and if they are related to the strategic plan. The Rector answered that in some cases, the KPI are very clear and quantitative, and in other cases they could perhaps be further operationalized. It could be nice with a one-page dashboard with KPIs.

There was a question about the evaluation of the Faculty of Education. The current coalition government has made it a part of their agreement to evaluate the Faculty of Education, but there is no indication that there will be a separate evaluation of the Faculty of Education conducted in the Faroe Islands by Faroese evaluators. Instead, the Faculty of Education will get extra focus as a part of the external review of the University (see item 5).

It was asked if we include field practice in the quality assurance system. The answer is that field work is not included yet in the work of the Quality Unit. Not all our programmes or courses yet have appropriately developed descriptions, and those are our first priority. We have started at a low level and are working our way towards full and improved quality procedures, including the assurance of practical placements.

'Me too' and sexual harassment was also brought up. It is a sensitive issue, but it must be addressed. Students are asked about the subject in the student satisfaction survey, but we need to improve how we ask the questions, and next year we probably will ask the questions with some time constraint. The University Director informed that nobody has formally contacted us with a complaint on harassment. Deans have been speaking about the subject at faculty level in a general manner.

Student wellbeing is a potential theme for collaboration with the Student Council this year. It is also important to continue to be aware and have attention on the matter. Also, all educations at UFI could in future have a common theme about what it means to be a professional.

The Rector recently wrote a public statement regarding harassment and threats against a researcher at UFI.

The Board members were happy with how the things are going with the implementation of the Strategic Plan. A lot has been achieved in a short time and also in generally challenging circumstances. The Rector suggested starting on a new strategic plan before 2024 when the current plan expires. We could begin to discuss the new strategic plan and have a new plan ready in the

spring of 2023. That means that we continue for a year and then start a new process. At that point we will also have at least a draft report from the external review.

**8. Forthcoming external Review of the University (Papers 6 & 7)**

The Rector outlined the information the University has received about the forthcoming review – the main review team, the brief it will be working to, and the schedule for completion of the review. The chair of the team is a retired Scottish professor who has extensive experience with review and evaluation processes and is currently Chair of the Scottish Credit and Qualifications Framework. The questions for the review team are very broad and the approach is one of "review to enhance/develop". The main focus is to be on "the strengthening of the quality assurance processes at the University". The key thing is that we want a robust evaluation that can help us to progress.

There was a question from a Board member about the relevant law, and there was some discussion about that. The Board member felt the law was not very precise in indicating how the review should be conducted. The Rector indicated that the forthcoming review is broadly following the lines of a previous review, and to that extent there seems to be an understanding regarding how the law is translated into practice. But this is something the review team itself might look at as part of its deliberations (review of relevant legal and regulatory framework).

The Rector also presented the schedule for the review, which is from October 2021 until October 2022, when the final report will be submitted (paper 7). The review team will visit us twice; once in October 2021 and then in March 2022, according to the current plan.

Bergur D. Hansen, Pro-Rector for Education had joined the meeting after the break. In relation to the focus of the forthcoming review, he spoke about the Quality Unit (QU) at the UFI and the work they are focusing on now. Bergur informed about differences between faculties and programmes, and that this is a cultural issue. Therefore, the QU has spent a lot of time getting all faculties towards a level of adequacy.

The QU is focusing on design of programmes and profiles. 26 programmes were running last year and 22 out of those 26 had their profiles assessed and approved, while the last four are waiting to be approved. Some programmes have no full programme description at all and must start from scratch, but we are definitely making progress; we have a quality enhancement forum, and we are slowly changing the culture and the way people are working. Also, a quality policy is in the draft, and we are working on collecting all relevant documents in a quality handbook. QU is also focusing on how the students experience the courses and the programmes. A further stage will be that we need an internal process to validate programmes – with external experts. A board member and staff at UFI mentioned that she is very happy to have a place to go for guidance for quality assurance.

**9. Campus Development (Oral report from Chair)**

The Chair of the Board briefed about the campus development. The campus group is having good discussions and is working on a report that is almost ready to be published. The report is mainly oriented towards the members in the group and towards the Ministry. The status is that we are waiting for the Municipality and the Ministry to agree upon ownership on the area where the campus is planned to be placed and built. It is taking a long time for them to reach an agreement, and this is our biggest obstacle. Another urgent matter is the building that the Faculty of Education (placed on the campus area) is in, which is in very poor condition. The third and final thing is to start an architectural competition and get around 3.5 million to fund the competition. The campus group is pushing to get grant/finance for that shortly.

The Chair of the Board thanked everyone for a good meeting. We will meet again 26th of November and we hope that we again can meet in person for that meeting.

**The meeting ended at 11.30**

# Føroysk umseting av fundarfrásøgnini frá stýrisfundinum 3. september 2021

***Endamálið við fundinum: At greiða frá gongdini og komandi avbjóðingum og umrøða framstigini í strategiætlanini 2020-2024.***

**Fundarskrá fyri stýrisfund 3. september, 8:30-11:30:**

1. Stýrisformaðurin bjóðar vælkomin, og góðkenning av fundarskrá (skjal 1)
2. Góðkenning av fundarfrásøgn frá 11. mai 2021 (skjal 2)
3. Fíggjarfrágreiðing – frá fíggjarleiðaranum (skjal 3)
4. Arbeiðsgongd/ avgerðargongd hjá stýrinum (harímillum at gera tilmæli)
5. Frágreiðing um gongdina síðan seinasta fund frá rektaranum (munnlig framløga – skjalið lýsir yvirskriftirnar. Skjal 4)
6. Tilnevning av dekani á Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi – uppskot um at leingja setanina hjá sitandi dekani
7. Frágreiðing frá rektaranum um gongdina í strategiætlanini 2020-2024 (skjal 5 – til framløgu og umrøðu)
8. Uttanhýsis eftirmetingin av Setrinum, sum stendur fyri framman (skjal 6 & 7)
9. Støðan viðvíkjandi kampus (munnlig framløga frá stýrisformanninum)

1. **Stýrisformaðurin bjóðar vælkomin, og góðkenning av fundarskrá (skjal 1)**
   Fundarskráin fyri fundin varð góðkend.

2. **Góðkenning av fundarfrásøgn frá 11. mai 2021 (skjal 2)**
   Ein stýrislimur hevði eina viðmerking til mál 4 í frásøgnini frá seinasta stýrisfundi, og ynskti at leggja greiðari áherðslu á, hvussu óheppið tað er, at vit krevja luttøkugjald fyri útbúgvingar, sum Fróðskaparsetrið bjóðar. Til tað svaraði rektarin, at hann var samdur, men vísti á, at útbúgvingin hevur verið umbiðin av arbeiðsgevarum, ið eru sinnað at gjalda, og at útbúgvingin ikki hevði verið boðin út annars, tí eingin fígging er frá landsstýrinum til útbúgvingina. Báðir partar skiltu støðuna. Tað var lagt afturat, at líkandi verður tikið upp á stýrisfundi, um ætlanir eru at taka luttøkugjald fyri aðrar útbúgvingar.
   Síðani varð fundarfrásøgnini frá 11. mai góðkend.

3. **Fíggjarfrágreiðing – frá fíggjarleiðaranum (skjal 3)**
   Fíggjarleiðarin legði roknskapin fyri juli fram. Nakað av avlopi er á øllum Setrinum, og tað er sannlíkt, at í alt tvær milliónir eru eftir at brúka í hesum árinum. Tað er ein øgiliga lítil partur av tí samlaðu játtanini og vit miðja eftir at brúka peningin á skynsaman hátt til at stuðla førleikamenning av starvfólki og til stuðla ph.d.-verkætlanum, sum hava verið ávirkaðar av koronu.
   Ein stýrislimur nevndi, at danska stjórnin hevur sett pening av til sosial tiltøk fyri lesandi, sum øll hava verið ávirkað av koronustøðuni. Skotið var upp, at studentafelagið MFS ella Ráð teirra lesandi kundu tikið málið upp við landsstýrið. Ráð teirra lesandi hevur annars eina játtan, sum tey kunnu brúka til sosial tiltøk, og fleiri sosial tiltøk hava eisini nýliga verið hildin í samband við innleiðsluvikuna á Setrinum. Yvirskipað hevur sosiala lívið í Føroyum verið nógv minni ávirkað av koronu enn í Danmark.

4. **Arbeiðsgongd/ avgerðargongd hjá stýrinum (harímillum at gera tilmæli)**
   Ein stýrislimur hevði biðið um at umrøða yvirskipaðu arbeiðs- og avgerðargongdirnar hjá stýrinum, eftir at stýrið hevði sent Fíggjarmálaráðnum eitt tilmæli fyrr í ár. Tilmælið varð sent til góðkenning hjá stýrislimunum, og tá eingi svar komu, varð tilmælið tulkað sum góðkent.
   Eitt uppskot var, at tað hevði verið lættari at tikið avgerð um avgerðin varð løgd fram týðiligari, og um allir stýrislimir geva greitt svar. Summi mál kunnu vera trupul at umrøða umvegis teldupost og í summum førum átti at verið innkallað til (stuttan) eykafund. Tað var eisini semja um, at um tað verður tikið avgerð umvegis teldupost, so eigur avgerðin at verða nevnd í næstu stýrisfundarfrásøgn. Ein stýrislimur legði afturat, at tað er umráðandi, at alt stýrið er samt um avgerðir, og at atkvøðugreiðsla verður nýtt sum minst.
   Í samband við tilmælið ið varð sent Fíggjarmálaráðnum, var tað á fundinum í dag semja um, at eitt ískoyti verður lagt afturat seinastu fundarfrásøgnini.
   Aftaná varð prátað um hoyringar, ið javnan verða sendar til Setrið. Uppskot var um, at stýrið kundi verið spurt til ráðs um hoyringar, men tað varð hildið at vera ov tíðarkrevjandi, um allar hoyringar verða sendar stýrinum hvørja ferð. Hoyringarsvar kundu í staðin verið savnað í eini frágreiðing, sum verður latin stýrinum – uttan so, at talan er um størri mál, ið krevur umrøðu í stýrinum. Ein stýrislimur legði afturat, at tað altíð er best at senda eitt samlað hoyringarsvar frá Setrinum, heldur enn at senda fleiri frá hvørjari deild. Sjónarmiðið hjá Setrinum er sjónarmiðið hjá øllum Setrinum og eigur at vera sent við myndugleika frá leiðsluni á Setrinum. Tað varð nevnt sum eitt hugskot, at allar hoyringar kundu verið lagdar á heimasíðuna hjá Setrinum, tí hoyringar eru almennar upplýsingar kortini.

   **At gera til næstu ferð: Fyrisitingarstjórin kunnar viðkomandi partar í samband við hoyringar, sum viðvíkja Setrinum.**

5. **Frágreiðing um gongdina síðan seinasta fund frá rektaranum (skjal 4)**
Rektarin legði fram frágreiðing um gongdina síðan seinasta fund. Rektarin hevur saman við leiðslutoyminum á Setrinum roynt at funnið røttu javnvágina at røkka málum og seta í verk nýggjar broytingar, uttan at hetta verður gjørt á ein hátt, sum ikki er haldgóður.

Millum evnini, sum vóru fevnd av frágreiðingini, kunnaði rektarin um, at Setrið í 2020 hevði hægsta talið av prógvum í einum kalendaraári og tað sær út til, at vit fáa samsvarandi tøl fyri 2021, og at vit eisini hava fingið nógv nýggj lesandi í 2021. Allar deildir hava sett støðufesti og fráfall í miðdepilin, og hagtølini fyri, hvat tey lesandi gera aftan á loknan lestur eru sera góð. Starvsfólkasamrøðurnar (menningarsamrøðan 'MCPDC') eru í gongd og hava gingið væl. Eitt annað týðandi evni er arbeiðið við góðskutrygging. Framstig hava verið við góðskutryggingini, men til tíðir mugu starvsfólk sannførast um týdningin av arbeiðinum. Arbeiðið hjá Granskingar- og framtakseindini gongur eisini framá, men tað er avbjóðandi at fáa starvsfólk at søkja um uttanhýsis stuðul og at nýta galdandi mannagongdir til at søkja eftir. Onnur evni, ið eisini vórðu nevnd, vóru góðkenning frá donskum myndugleikum av okkara løgfrøðiútbúgving og vitjanin av Frederick Schauer professara í juni.

Rektarin tosaði um tríggjar samanhangandi, yvirskipaðar avbjóðingar. Hann greiddi frá, at hesar eisini hoyra til mál nummar 7 á skránni:

- At hava passaliga ferð á broytingum og at fáa tær at standa við, serliga tá ið starvsfólk krevja nógvan stuðul til at seta broytingarnar í verk ella til at arbeiða í samsvar við broytingarnar;
- At styrkja fatanina – út um bara leiðslutoymið - av broytingum, meðan tær eru ávegis og skilja, hví tær eru umráðandi. Hetta er ein spurningur um mentan og professionalismu. Tað snýr seg eisini um at fáa starvsfólk at skilja, at vit ikki altíð kunnu vera framúrskarandi, men at vit eisini mugu leggja okkum eftir at fylgja grundleggjandi arbeiðsgongdum, sum longu eru settar í verk aðrastaðni. Tann komandi uttanhýsis eftirmetingin, sum fer at vera gjørd av Setrinum, er eitt gott høvi at styrkja neyðugu fatanina av broytingunum. Ein umfatandi umrøða av hesum var á fundi í víðkaða leiðslutoyminum (EULT) síðst í august. Rektarin kunnaði um eitt tiltak í næstu viku fyri øll starvsfólk á Setrinum, har rektarin fer at greiða starvsfólki frá uttanhýsis eftirmetingini. Hetta er eitt gott høvi at koma við einum heildarsjónarmiði fyri alt Setrið og styrkja eina felags fatan og ábyrgd av teimum broytingum, sum vit fremja;
- Samstarvið við Mentamálaráðið er sum heild sera gott, men ikki altíð fyrimyndarligt, tí tey ikki hava drúgvar royndir ella serkunnleika til at arbeiða við hægri lestri.

Tað bleiv spurt, um tað var nakað, sum stýrið kundi gera fyri at fáa Mentamálaráðið til at taka avgerð um ta eyka upptøkuna av lesandi til námsfrøði og sjúkrarøktarfrøði. Semja var um, at um einki hendir skjótt, so skal stýrisformaðurin tosa við landsstýrið um málið.

Stýrið tók væl ímóti frágreiðingini og hildu hana vera upplýsandi og gagnliga.

6. **Tilnevning av dekani á Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi – uppskot um at leingja setanina hjá sitandi dekani**
Starvið sum dekanur á Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi skal endurnýggjast, og sitandi dekanur er sinnaður at halda fram. Rektarin upplýsti, at dekanurin er sera íðin, fær nógv av skafti, dugir væl at lata uppgávur í hendur hjá øðrum og vit hava víðfevnda nyttu av honum. Hann er eisini pro-rektari fyri gransking og framtak. Rektarin upplýsti, at vit hava longt setanina hjá hinum dekanunum tey seinastu árini uttan at fara í gjøgnum aðrar tilgongdir - við einum undantaki, tá ein dekanur sjálvur ynskti aðra setanartilgongd (sami dekanur varð settur aftur í starv). Rektarin heitti at enda á stýrið um at góðkenna, at setanin hjá dekaninum varð longd.

Stýrið umrøddi síðani at leingja setanina og tað var semja um, at vit ikki ynskja, at setanir uttan víðari verða longdar. Starvssetanin hjá einum dekani er trý ár og í løtuni er einki týðiligt mark fyri, hvussu ofta setanin hjá einum dekani kann verða longd. Tað varð skotið upp, at setanin hjá einum dekani kann leingjast til aðru starvssetu, men í fall at ein triðja starvsseta kemur upp á tal, so eigur ein almenn setanartilgongd at vera, tí tað er umráðandi at eggja øðrum til at søkja og til at stremba eftir at gerast dekanur. Stýrið var samt um, at hetta eigur at vera framferðarhátturin framyvir. Rektarin kunnaði um, at deildirnar hava vara-dekanar (við einum undantakið í løtuni) og deildarleiðslutoymi, og har vóna vit at mynda dugnaligar leiðarar, sum ein dag kunnu gerast dekanar. Allir stýrislimir tóku undir við at leingja setanina av dekaninum á Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi til aðru starvssetu.

Lønin fyri at átaka sær eyka ábyrgd varð eisini nevnd. Rektarin kundi hugsað sær at prátað við Mentamálaráðið um tær peningaligu samsýningarnar, sum vera latnar fyri at átaka sær eyka ábyrgd á Setrinum og sum heild. Hann heldur, at hesar eru øgiliga lítlar.

7. **Frágreiðing frá rektaranum um gongdina í strategiætlanini 2020-2024 (skjal 5 – til framløgu og umrøðu)**

Rektarin legði sína hálvárligu frágreiðing fram og kunnaði um, at stýrislimir kunnu biðja um at fáa eina útgávu av frágreiðingini, har til ber at síggja broytingarnar, sum eru gjørdar síðan seinast. Rektarin gekk í gjøgnum raðfestingar og størstu framstigini fyri hesi málini:

- Lesturin og framgongd hjá teimum lesandi
- Gransking og framtak
- Fólk og stovnur
- Føroyska málið
- Uttanhýsis tilknýti og samstarv
- Tilfeingi

Aftaná framløguna var ein spurningur um lyklatølini (KPI) og um tey eru knýtt at strategiætlanini. Rektarin svaraði, at í summum førum eru lyklatølini týðilig og løtt at máta, og í øðrum førum er helst neyðugt at nágreina, hvussu tað skal mátast. Tað hevði verið gott við einum yvirliti av lyklatølum á einari síðu.

Ein spurningur kom um eftirmetingina av Námsvísindadeildini. Tað er ein partur av samgonguskjalinum hjá tí sitandi landsstýrinum, at Námsvísindadeildin skal eftirmetast, men einki bendir á, at tað fer at vera ein serstøk eftirmeting av Námsvísindadeildini í Føroyum av eini føroyskari eftirmetingarnevnd. Í staðin verður serliga hugt eftir Námsvísindadeildini, sum partur av samlaðu uttanhýsis eftirmetingini av Setrinum (sí mál 5).

Ein spurningur var, um starvsvenjingar eisini verða umfataðar av okkara góðskutrygging. Svarið er, at starvsvenjingar ikki eru umfataðar av arbeiðnum hjá Góðskueindini. Hvørki allar útbúgvingar ella øll undirvísingarskeið hava nøktandi lýsingar og hetta verður raðfest sum tað fyrsta. Vit eru byrjað á lágum stigi og arbeiða ímóti fullfíggjaðum og betri mannagongdum fyri góðsku, m.a. trygging av starvsvenjingarstøðum.

'Me-too' og kynsligur ágangur varð eisini borin upp á mál. Tað er eitt eymt evni, men tað skal viðgerast. Lesandi vórðu spurd um evnið í trivnaðarkanningin, men vit mugu orða spurningin betri, og næsta ár fara vit helst at seta spurningin við eini tíðaravmarking. Fyrisitingarstjórin upplýsti, at eingin formlig klaga er komin um ágang. Dekanar hava tosað yvirskipað um málið á deildarfundum.

Trivnaður hjá teimum lesandi er nakað, sum vit møguliga ætla at samstarva við Ráð teirra lesandi um í ár. Tað er eisini umráðandi at vera varug við og geva sær far um evnið. Allar útbúgvingar á Setrinum kundu í framtíðin havt eitt felags tema um, hvat tað vil siga, at vera professionellur til arbeiðis.

Rektarin sendi fyri stuttum eitt alment skriv út í samband við, at ágangur og hóttanir hava verið móti einum granskara á Setrinum.

Stýrislimirnir vóru væl nøgdir við gongdina og framstigini í strategiætlanini. Vit hava nátt nógvum upp á stutta tíð, eisini undir truplum umstøðum. Rektarin skeyt upp, at vit kundu sett hol á eina nýggja strategiætlan áðrenn 2024, tá tann núverandi ætlanini fer úr gildi. Vit kundu byrjað at tosað um ta nýggju strategiætlanina og havt eina nýggja ætlan klára á vári 2023. Tað vil siga, at vit halda fram í eitt ár og byrja so eina nýggja tilgongd. Til tað tíð hava vit - um ikki eina lidna, so - eitt uppskot til eina frágreiðing frá uttanhýsis eftirmetingini.

**8. Uttanhýsis eftirmetingin av Setrinum, sum stendur fyri framman (skjal 6 & 7)**

Rektarin greiddi við fáum orðum frá kunningini, sum Setrið hevur fingið um uttanhýsis eftirmetingina – um eftirmetingartoymið, skrivið, sum tey arbeiða út frá, og tíðarætlanin fyri nær eftirmetingin eftir ætlan er liðug. Formaðurin í toyminum er ein fráfarin skotskur professari, sum hevur drúgvar royndir við eftirmetingum, og sum í løtuni er formaður fyri tað skotska '*Credit and Qualifications Framework*'. Spurningarnir hjá eftirmetingartoyminum eru breiðir, men "at eftirmeta fyri at bøta um/menna" er mátin tey fara undir eftirmetingina. "At styrkja tilgongdir til góðskutrygging á Setrinum" er í miðdeplinum. Tað týdningarmesta er, at vit vilja hava eina dygdargóða eftirmeting, sum stuðlar okkara framgongd.

Ein stýrislimur spurdi um ta avvarðandi lógina, og tað varð síðan tosað um hana. Stýrislimurin helt ikki, at lógin segði nakað ítøkiligt um, hvussu eftirmetingin eigur at vera gjørd. Rektarin vísti á, at komandi eftirmetingini í stóran mun fylgir framferðarháttinum hjá tí undanfarnu eftirmetingini, og í so máta virkar tað til at vera ein felags fatan av, hvussu lógin riggar í roynd og veru. Men hetta er eitt evni, sum eftirmetingartoymið møguliga fer at taka upp (eftirmeting av avvarðandi lógum og kunngerðum).

Rektarin legði eisini tíðarætlanina fyri eftirmetingina fram, sum varar frá oktober 2021 til oktober 2022, tá ið tann endaliga frágreiðingin verður latin inn (skjal 7). Sambært verandi ætlan kemur eftirmetingartoymið á vitja tvær ferðir; einaferð í oktober 2021 og síðan í mars 2022.

Bergur D. Hansen, pro-rektari fyri góðsku, luttók á fundinum aftan á steðgin, og greiddi frá Góðskueindini á Setrinum og tí arbeiði, sum tey savna seg um í samband við, at eftirmetingin stillar góðsku í miðdepilin. Bergur kunnaði um munin millum deildir og útbúgvingar, og at hatta er ein mentanarlig avbjóðing. Tískil hevur Góðskueindin brúkt nógva tíð upp á at fáa allar deildir á eitt nøktandi støði.

Góðskueindin arbeiðir við lýsingum av útbúgvingum og profilum. 26 útbúgvingar vóru í fjør og 22 av teimum vóru mettar og góðkendar, men tær síðstu fýra bíða eftir at verða góðkendar. Nakrar útbúgvingar hava als onga fullfíggjaða lýsing og mugu byrja á berum, men vit gera heilt avgjørt framstig; vit hava ein Bolognabólk og vit eru spakuliga í ferð við at broyta mentanina og mátan, sum fólk arbeiða upp á. Ein góðskupolitikkur er á veg, og vit arbeiða við at savna øll viðkomandi skjøl í eini handbók fyri góðsku. Góðskueindin varpar eisini ljós á, hvussu tey lesandi uppliva skeið og útbúgvingar. Næsta stig er at fáa innanhýsis tilgongdir at góðkenna útbúgvingar og geva teimum gildi – við uttanhýsis serfrøðingum. Ein stýrislimur og starvsfólk á Setrinum nevndi, at hon er sera glað fyri at hava eitt stað at fáa ráðgeving um góðskutrygging.

**9. Støðan viðvíkjandi kampus (munnlig framløga frá stýrisformanninum)**

Stýrisformaðurin kunnaði um gongdina við kampus. Í kampusbólkinum eru góð orðaskifti og arbeitt verður við eini frágreiðing, sum næstan er klár at senda út. Frágreiðingin er fyrst og fremst ætlað limunum í bólkinum og Mentamálaráðnum. Støðan er tann, at vit bíða eftir kommununi og Mentamálaráðnum um at semjast um ognarviðurskiftini á økinum, har kampus eftir ætlan skal byggjast. Tað tekur langa tíð hjá teimum at finna eina semju og tað er okkara størsta forðing. Eitt annað umráðandi mál er bygningurin, ið Námsvísindadeildin (sum er staðsett á kampusøkinum) húsast í, sum er í sera ringum standi. Tað triðja og síðsta málið er at byrja eina

arkitektakapping og fáa umleið 3,5 mió. kr. í fígging til kappingina. Kampusbólkurin skumpar undir at fáa pengar settar av til hetta beinanvegin.

Stýrisformaðurin takkaði øllum fyri ein góðan fund. Vit hittast aftur 26. november og vóna, at vit eisini tá kunnu møtast fysiskt.

**Fundurin endaði kl. 11:30**